**Granskingardepilin fyri Økismenning**

*Skrivstovan í Klaksvík*, Jústabrekka 1, Postboks 159, 800 Klaksvík, Tlf. 457744, Fax. 457743

*Skrivstovan í Vági*, Vágsvegur 48, Postboks 18, 900 Vágur, Tlf. 374477, Fax. 374476

T-postur: region@region.fo - Heimasíða: www.region.fo

Vágur, 2. Nov. 2006

# Tíðindaskriv

## Útgáva av Arbeiðsrit 11/2006: Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini

**Granskingardepilin fyri Økismenning hevur givið út eitt nýtt arbeiðsrit – Arbeiðsrit 11/2006 við heitinum "Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini". Dennis Holm, samfelagsfrøðingur og Bogi Mortensen, siviløkonomur, hava skrivað arbeiðsritið.**

### Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum

Seinastu ártíggjuni eru stórar broytingar farnar fram í føroyska samfelagnum sum heild, eisini á vinnuliga økinum. Moderniseringin og menningin av samfelagnum hevur ført við sær, at vinnumynstrið er broytt. Meðan tað fyrr vóru framleiðsluvinnurnar – serliga fiskivinnan á landi – sum vóru tær berandi, eru tað tey seinastu árini almennar- (og -privatar) tænastur og almenn umsiting, sum hava størstu framgongd og eru tær vinnur, sum krevja flest fólk

Minkandi tal av arbeiðsfólki innan framleiðsluvinnurnar er eisini ein gongd, sum hevur merkt Vesturheimin sum heild tey seinastu ártíggjuni. Ikki minst er gongdin styrkt eftir at tað er vorðið alsamt meiri vanligt at flyta framleiðslur til lond, har lønarkostnaðurin er væl lægri enn í Vesturheiminum.

Avbjóðingin fyri "tær gomlu" framleiðsluvinnurnar og fyri (lokal)samfelagið, sum hevur havt hesar vinnur sum kjarnuvinnur, er at tillaga seg til broyttu støðuna, til tær nýggju avbjóðingarnar, sum broytingarnar hava ført og koma at føra við sær. Hetta er eisini støðan í Føroyum.

Í arbeiðsritinum er foksu sett á evnið "arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini" og roynir frágreiðingin m.a. at svara nøkrum spurningum í sambandi við hvørji arbeiðsfólkini á flaka- og fiskavirkjunum eru í dag, og hvørji vit kunnu vænta fara at manna hesi arbeiðspláss í framtíðini.

### Ein trupulleiki í eygsjón

Kanningar sum Granskingardepilin fyri Økismenning hevur gjørt – bæði tann millum arbeiðsfólk á flaka og fiskavirkjunum (í 2006) og ein kanning millum ung í 9. flokki og 3. flokki á miðnámsskúlunum (í 2003) – geva greiðar ábendingar um, at áhugin fyri at arbeiða innan fiskivinnuna á landi er minkandi.

Kanningin millum tey, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum, vísir, at nógv kundu hugsa sær annað arbeiði, hetta hóast trivnaðurin í vinnuni sum heild er góður. Tey sum ynskja annað arbeiði

eru serliga tey, sum eru yngri enn 30 ár, men hetta er somuleiðis galdandi fyri ein part av teimum, sum eru í aldrinum 30-39 ár og 40-49 ár. Um kanningin verður brúkt sum grundarlag fyri eini umrokning (í mun til talið av lønmóttakarum innan fiskavøruídnaðin), so vísir kanningin, at 600-800 fólk (39% av 1500-2000 arbeiðsfólkum) á flaka- og fiskavirkjunum kundu hugsa sær at farið í annað arbeiði.

Kanningin vísir eisini, at foreldur (sum arbeiða í fiskivinnuni á landi), ynskja ikki, at børn teirra skulu fara at arbeiða í fiskivinnuni á landi. Við øðrum orðum, verandi ættarlið á flaka- og fiskavirkjunum ynskja ikki, at komandi ættarlið skal fara í somu vinnu sum tey.

Kanningin millum ung í 2003 vísir, at ung ynskja ikki at arbeiða í fiskivinnuni á landi. Bert 3,2% av teimum ungu ynskja, at fiskivinnan á landi skal gerast teirra framtíðar arbeiðspláss. Høvuðsorsøkin er, at tey ungu ynskja at taka eina útbúgving, sum gevur teimum møguleika at vinna meiri pengar og fáa eitt spennandi og fakliga avbjóðandi arbeiði.

Samanumtikið vísa kanningarnar báðar:

- Ein munandi partur av teimum, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum, ynskja annað arbeiði
- Verandi ættarlið á flaka- og fiskavirkjunum ynskja ikki, at komandi ættarlið / børn teirra skulu arbeiða í fiskivinnuni á landi.
- Tey ungu – komandi ættarlið á arbeiðsmarknaðinum – ynskja ikki at arbeiða í fiskivinnuni á landi.

Hendan frágreiðingin gevur svar uppá fleiri áhugaverdar spurningar viðv. arbeiðsmegini á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini. Men eins og aðrar frágreiðingar av hesum slagi, so setir hendan frágreiðingin eisini fleiri nýggjar spurningar, sum krevja viðgerð – í hesum føri bæði av vinnuni, fakfeløgum og frá politiskari síðu.

Ein týðandi partur av at menna einhvørja vinnu er at arbeiða við teimum avbjóðingum og hóttanum og møguleikum, sum vinnan hevur ella kann fáa. Niðurstøðurnar í Arbeiðsritinum *Arbeiðsmegin á flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini* gevur ábendingar um at stórar avbjóðingar eru fyri framman, har tað er neyðugt at arbeiða miðvíst við at loysa tær avbjóðingar, sum eru og sum fara at koma í næstu framtíð.

**www.region.fo**
Arbeiðsritið kann takast niður í pdf-formati á heimasíðuni hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning – www.region.fo - undir útgávur og Arbeiðsrit og kann eisini fáast í prentaðum líki við at venda sær til Granskingardepilin fyri Økismenning.

Vinarligar heilsanir

Dennis Holm

Dennis Holm, settur leiðari
Granskingardepilin fyri Økismenning